## Íleggjaraáhugin økist

Danir brúka í vaksandi mun sparipengarnar í íløgusamtøkunum, sum í januar upplivdu størstu innskotini í fýra ár. Tað eru serliga privatir íleggjarar, sum hava gjørt íløgur fyri nærum átta milliardir krónur í samtøkunum. Økingin er harvið komin upp á 50 milliónir krónur seinastu tíggju mánaðirnar. Sambært virðisbrævamiðstøðini VP Securities eiga umleið 835.ooo danir nú íleggingarbrøv, og í januar gekk tað best hjá íleggingarsamtøkum, sum handlaðu við donskum, eystureuropeiskum og japanskum virðisbrøvum, skrivar boersen.dk.




## Noreg missir upp á SAS

Síðani SAS-partabrøvini vóru mest verd í 2007, hevur norski statuin upplivað eitt kurstap á 99%, svarandi til 3,3 milliardir norskar krónur. Greinarar vænta, at partabrævaemissiónin í 2009 ikki verður seinastu ferð norski staturin spýtir pengar í kreppurakta flogfelagið. Í juni 2001 átti Noregi partabrøv í SAS til eitt virði av tveimum milliardum norskum krónum, og í 2007 var upphæddin vaksin til 3,4 milliardir, men eftir fíggjarkreppuna er virðið minkað niður í bert 56 milliónir norskar krónur. Tað svarar til ein miss á 3,3 milliardir norskar krónur ella 99%, skrivar boersen.dk.



# Kirkjan má skifta orð um uppafturgiftu

**Helena Dam á Neystabø, landsstyriskvinna ætlar sær ikki at broyta hjúnarbandslógina og kunngerðina, sum heimilar prestum at siga nei til at gifta fráskild fólk**

FÓLKAKIRKJAN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað eru tey, sum siga, at landsstýriskvinnan í kirkjumálum kann loysa trupulleikan við, at summir prestar ikki vilja bíga fráskyld fólk aftur. Hon kann bara broyta lógina og kunngerðina, og so er tað liðugt, halda fólk.

Men so einfalkt er tað ikki, heldur Helena Dam á Neystabø.

Øðrvísi hevði verið, um hetta var eitt vanligt politiskt mál, men kirkjan er nakað annað, tí hon er ein serligur stovnum við sínum reglum og siðvenjum, sigur hon.

– Tað er mín fatan, at prestur skal endurspegla ta fatan, sum kirkjuliðið hevur, og sum eg havi skilt, er tað ein lítil partur av kirkjuliðinum, sum heldur, at fráskyld ikki skulu kunna vígast aftur. Prestarnir, sum hava hesa áskoðan, eru heldur ikki so nógvir, sigur Helena Dam á Neystabø.

### Kirkja má taka støðu

– Hon heldur stundina vera komna til, at tað kemur eitt orðaskifti í gongd, um áskoðanin hjá teimum prestunum er sambærlig við tað, sum kirkjan vil hava. Vit mugu hava fram grundgevingarnar eru fyri at siga nei, og ikki bara vísa til skriftstøð, tí tey kunnu brúkast bæði til at argumentera fyri og ímóti. Summi vísa til, skriftstøð, sum forbjóða, at fráskyld fólk verða vígd aftur, men tað finnast eisini orð um at góðtaka ein hvønn syndara.

– Vit mugu vita. Hvat er rætt og rímiligt. Tolsemi skal til, og tolsemi má ganga báðar vegir, sigur Helena Dam á Neystabø.

– Hon heldur annars, at kirkjan eins og samfelalagið sum heild eigur at flyta seg, hvat viðvíkur siðvenju og morali.

– Helena Dam á Neystabø heldur, at uppi í orðaskiftinum hanga spurningar sum diskriminasjón a la 266b, mannarættindi, rættartrygd og tolsemi.

– Tað orðaskiftið má førast innan fyri kirkjuna, tí vit kunnu ikki broyta lógir, sum stríða við tað, sum kirkjan sjálv vil, sigur Helena Dam á Neystabø.

# Kirkjan vísir ongum frá sær



*Jógvan Fríðriksson heldur, at kirkjan eigur at kunna hýsa prestum við ymiskum áskoðanum*

**Um ein prestur ikki vil ella kann víga fráskyld fólk, hevur hann skyldu til at finna ein annan prest, sum kann taka ábrygd av vígsluni. Hesi boð eru júst komin frá Jógvani Fríðrikssyni, bispi**

FÓLKAKIRKJAN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Nú orðaskifti hevur tikið seg upp um, at nakrir prestar siga nei til at víga fráskyld aftur, hevur Jógvan Fríðriksson, bispur, kunngjørt greiðar reglur fyri, hvussu mannagongdin skal vera í slíkum førum.

Vil ein prestur ikki víga eitt par, áliggur tað hesum prestinum at finna ein annan prest, sum kann taka ábyrgdina av vígsluni. Ein annar máti er, at noktandi presturin sjálvur setir seg í samband við bisp ella dómpróst, sum so taka ábrygdina av vígsluni.

– Grundarlagið undir hesum er, at Fólkakirkjan vísir ongum frá sær. Øll fólk hava krav upp á tænastur sum vígslu, og tað skal ikki henda, at nakar kemur aftur sum av torvheiðum frá einum presti ella eini kirkjuskrivstovu eftir at hava biðið um at verða vígd. Tí hava eg niðurfelt hasar reglurnar, sum siga, at í sísta enda standi eg við ábyrgdini, sigur Jógvan Fríðriksson.

### Eitt prinsippmál

– Hann heldur ikki trupulleikan í tí praktiska vera so stóran, men hetta er eitt týdningarmikið prinsippmál og eitt álvarsmál. So nógv eru tey ikki, sum verða vígd meira enn eina ferð, og tey flestu, sum giftast aðru ferð, giftast í stillum í einum prestagarði.

– Jógvan Fríðrikkon veit ikki um nakað par, sum hevði biðið um at verða gift, ikki hevur fingiuð ynski sítt eftirlíkað.

– Mær kunnugt eru allar vígslur avgreiddar væl og virðiliga, sigur hann.

– Bispur viðgongur tó, at teir prestarnir, sum fegnir gifta fráskild, fáa enakað meira at gera enn hinir. Tað veit hann av egnum royndum, tí hann hevur upplivað at yvirtikið vígslur frá øðrum prestum.

### Einki nýttr

– Jógvan Fríðrikkson heldur tað ikki vera eitt nýtt rák, at summir prestar ikkiu vilja gifta fráskyld uppaftur. Talið av prestum við tí áskoðanini hevur elingi verið tað sama, og nú prestastørvini eru økt í tali, er tað heldur ein minni partur, sum noktar at víga fráskyld.

– Annars er mín støða, at tað er einki sum eitur at víga fráskyld. Tey, sum eru fráskyld, eru ikki gift longur. So einfalt er tað í míni verð, sigur Jógvan Fríðriksson.

– Hann nevnir eisini, at eitt týðandi mál hjá kirkjuni er at vísa tolsemi.

– Tolsemi eigur eisini at verða víst teimum prestum, sum hava ilt við at svølgja tað við at vída fráskyld. Øll skulu vit kunna vera í kirkjuni. Eingir prestar eru eins. Ein dugir betur eitt, og ein annar eitt annað. Ein prestur, sum ikki vil víga fráskyld, kann hava aðrar dygdir. Vit eiga at finna saman í eina fullkomna heild, sigur Jógvan Fríðriksson.